## DAGSINS MEINING

# Ein syngjandi lúsingur til Føroya fólk

Mikudagin samtykti Løgtingið fíggjarlógina. Samanumtikið verður tað trengri hjá føroyinginum at húsast. Samgongutingmenninir samtyktu øll uppskotini hjá meirilutanumn í Fíggjarnevndini, hóast arbeiðsgevarar, fakfeløg hjá tímaløntum og bøndur mótmæltu.

Samstundis feldu samgongutinglimir øll broytingaruppskot hjá minnilutanum. M.a. uppskot at skerja miðfyrisitingina, sum er bólgnað upp undir hesum landsstýrinum, og hevur fingið heili trý nýggj aðalráð.

Andstøðan á tingi helt, at her kundi sparast. Sparingar sum ikki raktu vanliga fólkið. Men Fólkaflokkurin, sum hevur talað og skrivað ímóti stóra almenna sektorinum seinastu 25 árini, gongur ímóti sínum egna politikki, vælsignar henda vøkstur, og atkvøður ímóti.

Tí kunnu vit staðfesta:
- **Tað verður dýrari at sigla við strandfaraskipunum, tí SL fær lægri játtan. Hetta rakar fyrst og fremst útjaðaran, serliga Suðuroynna!**
- **Mjólkin verður dýrari, tí brúkarastuðulin til bøndur verður skerdur. Hetta rakar fyrst og fremst barnafamiljurnar!**
- **Barsilsskipanin skal broytast. Hetta fær fyrst og fremst avleiðingar fyri tímalønt, m.a. flakakonur. Avleiðingin rakar ungu familjurnar og bygdirnar, har virkini eru!**
- **Endurgjaldið til meistarar fyri skúlatíðina hjá lærlingum lækkar. Vandi er fyri, at lærlingatalið lækkar. Meistarar skulu hava fleiri pengar inn og handverksarbeiði verður helst dýrari!**
- **Dagpeningaskipanin skal ikki gjalda fyrsta sjúkradagin. Tað skulu arbeiðsgevarar. Teir hava longu sagt, at hetta fær avleiðingar fyri tey veiku, sum hava flest sjúkradagar. Peningur fyri sjúkraendurgjald skal fáast inn og tí verða arbeiði dýrari, og kappingarførið versnar!**
- **Inntøkutrygdin hjá fiski- og útróðrarmonnum lækkar.**
- **Ítrótturin fær minni pening til ferðing. Tað rakar fyrst og fremst útjaðaran.**
- **Pápar missa endurgjald fyri barnapening og uppihaldspening fyri fyrrverandi hjúnafelaga. Tað rakar eisini børnini!**
- **Sjúkrahúsini fáa minni pening. Tað fær sjálvandi avleiðingar fyri røktina og bíðilistarnir leingjast.**
- **Stuðul til vinnuframa og gransking lækkar. Tað fær avleiðingar fyri strembanina at skapa størri virðisøking og fleiri arbeiðspláss.**

Umframt henda syngjandi lúsingin hækkar sjónvarpsgjaldið heilar 500 kr. árliga, so strembanin ímóti einum sjálvberandi búskapi er ein dyggur smeitur fyri privata búskapin – fyri vanliga føroyingin!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ynskir fyri javnstøðuarbeiðinum í 2003-2006

*Hygg ikki at veruleikanum,*
*sum hann er*
*og spyr 'hví'?*
*Hygg hvussu veruleikin*
*kundi verið*
*og spyr'hví ikki'?*
**Nelson Mandela**



**Vegna Javnstøðunevndina:**
*Annika W. Joensen, forkvinna*

12. desember 2002 hittust limirnir í nýsettu Javnstøðunevndina. Hesir eru Jan Mortensen fyri arbeiðsgevararnar, Jákup Páll Mohr Mortensen fyri arbeiðstakararnar Jancy Olsen fyri Kvinnufelagssamskipan Føroya, Hanna Ziskason Hansen fyri Mentamálaráðið og Annika W. Joensen, forkvinna, fyri Landsstýrið.

Á skránni var prát um javnstøðu og ynskir fyri hesum arbeiði komandi trý árini. Nevndin fylgir sum kunnugt landstýrinum og skal setast av nýggjum eftir næsta løgtingsval.

Avgjørt var at arbeiða sambært hugsanini í citatinum hjá Nelson Mandela, og fara vit í ætlanum okkara at miðja eftir stjørnunum. Vit fara at seta okkum høg mál og arbeiða miðvíst við at fremja tey. Lyklaorðið verður **semja** og styrkin verður, at vit lyfta **í felag.**

Tað er okkara sannføring, at javnstøða millum kynini í stóran mun snýr seg um, at vit virða okkum sjálvi. Bert soleiðis kunnu vit sýna næsta okkara virðing. Javnstøðan millum kynini byggir harnæst á ábyrgdarkensluni hjá hvørjum einstakum.

Vit lóggeva fyri javnstøðu, tí tað er neyðugt, men tað eru okkara gerðir í gerandisdegnum, sum skulu gera lógina livandi. Spurningurin, vit kunnu seta, er: Hvussu kann eg virka fyri, at menn og kvinnur í Føroyum hava somu møguleikar til persónligt frælsi? Og minnast til, at alt ger mun - 'Smáar løkir gera stórar áir'.

Tað er ikki eitt 'politiskt korrekt' citat, sum ger munin, men tey smáu sannførdu fetini. Broytingar skulu fremjast. Ikki bert tosast um.

Tað er okkara vón fyri ár 2003, at føroyingar taka undir við útsøgnini "kvinnur og menn eiga rætt til somu møguleikar" og at vit kunnu semjast um nøkur átøk, sum hava til endamáls at fáa forðingar av vegnum, sum í løtuni geva øðrum kyninum framíhjárættindi, sum ikki eru í samsvar við javnstøðulógina.

Fyri árini, sum koma er tað okkara vón, at føroyingar vilja siga sína hugsan og virka fyri, at javnstøða verður náttúrligur partur av nútíðar føroysku mentanini og samfelagsskipanini. Málið er ein hugburðsbroyting, sum sæst aftur í einum broyttum samfelagi, har kvinnur og menn ikki skulu 'passast inn', men sjálvi vera við til at laga samfelagið soleiðis, sum tað passar okkum.

Við orðunum hjá Nelson Mandela í huga fer nevndin til verka at virka fyri einum betri samfelagi, har øll hava somu møguleikar og harvið eiga rættindini til persónligt og økonomiskt frælsi.

Við ynskjum um eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

# Viðmerking til Karsten Hansen viðv. fíggjarlógini

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Arbeiðarafelag*

Í tíðindinum í Útvarpinum segði fíggjarmálaráðharrin, at vinnan átti at bera part av kostnaðinum at sparingunum á fíggjarlógini. Hetta tí at partafelagsskatturin varð lækkað-ur fyri nøkrum árum síðani.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at Karstin Hansen sleppur sær undan at tosa um veruliga trupulleikan. Tað, sum vit løgdu dent á, var, at talan als ikki er um sparingar av almennum rakstrarkostnaðum, men at útreiðslur verða lagdar yvir á onnur at gjalda.

Talan er tí ikki um sparingar, men tvørtur ímóti, at samfelag okkara enn einaferð verður dýrari at reka. Og tað er hesa skeivu gongd, sum vit vilja vísa á.

Um tað er so, at vit eru farnir skeivir í metingum okkara, vilja vit loyva okkum at spyrja Karstin Hansen, hvussu mong alment lønt ársverk eru spard á fíggjarlógini fyri 2003.

# Varp og Jólablað

Tað eru nakrir tungvektarar av bløðum, sum Sosialurin kemur út við hesar báðar seinastu útgávudagarnar fyri jól. Í blaðnum í dag er 40 síður stóra eykablaðið Varpið. Her finnast flestu av sjónvarpsskráunum, sum føroyingar síggja umframt útvarpsskráir og fevna tær um alla jólahalguna og fram til nýggja árið. Vónandi taka lesarar okkara væl undir við hesum okkara nýggja tiltakinum VARPINUM, sum tí eisini vónandi er komið fyri at verða. Heimurin verður alsamt minni og meira viðkomandi við tí tøkniligu menning, sum fer fram, og hetta ger eisini, at áhugin fyri at fylgja við í tí, sum hendir aðrstaðni á øllum økjum, veksur Tí meta vit at Varpið er ein sera hent tænasta fyri allar føroyingar, sum brúka part av síni livitíð at síggja útlendskar sjónvarpsrásir. Hava lesarar hugskot um, hvussu vit kunnu gera hetta blað uppaftur betri, so haldið tykkum imkki aftur at gera vart við tykkum. Vit geva so eisini út til jóla stórt eykablað, JÓLABLAÐIÐ við nógvum og fjølbroyttum tilfari. Vónandi kunnu vit við hesum báðum eykabløðum vera eitt gott íkast til eina friðsæla og óstrongda jólahátíð.

**Sosialurin**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Frá Javnstøðunevndini

**Tórshavn, 17. desember 2002**
*Annika W. Joensen, forkvinna*

Til uppskotið til broytingar í løgtingslógina um barsilsskipanina og til aðru viðgerðina í Løgtinginum hevur Javnstøðunevndin fylgjandi viðmerkingar:

**Avtøka av 6 mánaðarregluni**
Arbeiðarafeløgini og tinglimir hava víst á, at tær tímaløntu kvinnurnar kunnu gerast verri fyri fíggjarliga, meðan tær eru í farloyvi, um útgjaldið ikki kann roknast útfrá 6 teimum bestu inntøkumánaðunum í árinum, áðrenn tær eiga. Orsøkirnar eru, at tær hava skiftandi tímatal og m.a. at tær orsaka av graviditetinum ikki megna at arbeiða so nógv.

Sigast kann, at tímaløntu kvinnurnar eru fyri mismuni, um vit samanbera teirra støðu við støðuna hjá kvinnum í føstum starvi. Útgjaldið hjá kvinnum í føstum starvi ávirkast ikki av, at tær arbeiða minni enn vanligt - t.d. meðan tær eru við barni - tí tær kunnu sjúkrameldast.

Um endamálið við barsilsskipanini er at geva endurgjald fyri mista inntøku, og soleiðis javnstilla kynini á arbeiðsmarknaðinum, er broytingaruppskotið ikki í tráð við Javnstøðulógina, tá tað stillar summar kvinnur verri fyri enn tær vóru frammanundan barnsburðinum.

Tað eigur at bera til at orða lógina soleiðis, at endamál lógarins verður varðveitt og fyribyrgja, at nakrar kvinnur verða fyri mismuni.

**Longd farloyvistíð uttan lønarendurgjald**
Avleiðingarnar av broytingaruppskotinum kunnu væntast at gerast fleiri. Her verða viðgjørdar avleiðingar fyri kvinnuna, mannin og barnið.

*Avleiðingar fyri kvinnuna*
Av økonomiskum avleiðingum kunnu nevnast inntøkumiss hjá kvinnuni orsakað av fráveru á arbeiðsmarknaðinum og harvið eisini missur í pensiónini. Ein avleid avleiðing av hesum er, at kvinnan verður fyri vanbýti, tá størri ábyrgd og betri sømdir skulu forhandlast við arbeiðsgevaran. Hesin vil í flestu førum velja eitt fólk, sum er tøkt.

At tað verður kvinnan, sum verður heima hjá barninum longdu tíðina, er mest sannlíkt, tí í dag er tað inntøkan, sum avgerð, hvør ansar børnunum. Hóast tað møguliga kennist so hjá nógvum, so er hetta val í allarflestu førum ikki frælst, men knýtt at kapitaltørvinum hjá einstaka húskinum. Tann, sum forvinnur mest, verður verandi á arbeiðsmarknaðinum, meðan hin ansar børnum. Í Danmark sæst hetta 'arbeiðsbýtið' m.a. eisini aftur í hvør tekur fyrsta sjúkradagin hjá barninum.

Viðvíkjandi muninum í inntøkuna hjá kvinnuni og manninum er støðan í Danmark, sambært eini nýliga kunngjørdari kanning tann, at hesin veksur, tá børnini koma, tí maðurin arbeiðir meiri enn áður og kvinnan arbeiðir minni. Tað er vanligt, at kvinnan arbeiðir minni enn fulla tíð, tá hon fer til arbeiðis aftur eftir farloyvistíðina og tí verður hennara lutur sum nakað sjálvsagt at ansa húsi og heimi. Og tá hon leggur meiri orku í hetta, verður minni tíð til at arbeiða og forvinna sær pening. Tað er ein ónd ringrás, sum kann koma illa við, um kvinnan t.d. ein dag verður høvuðsforsyrgjari. Hetta er ikki í tráð við javnstøðuhugsanina, tí húsarhaldsarbeiðið er ólønt, og eiga vit í Føroyum at byrgja upp fyri, at lógarbroytingin, sum er til viðgerð í hesum vikum, ikki kemur at medvirka til mismun í arbeiðsmøguleikunum hjá kynunum.

Hetta kann m.a. gerast við, at pápinum verður tryggjað serliga farloyvistíð, sum bert hann kann nýta. Hetta var viðgjørt av tinglimum undir tí fyrstu viðgerðini, men undirtøka sýntist ikki at vera fyri at lóggeva á hesum økinum. Ei heldur sýnist undirtøka at vera fyri hesum millum arbeiðsgevarar.

At enda skal nevnast, at um illa vil til, minkar lógaruppskotið trýstið á kommunurnar at fáa ansingarpláss til børnini til vega, og ein avleiðing kann gerast, at kvinnan, sum longu hevur verið heima eitt ár, verður noydd at útseta lønta arbeiðslívið enn longur. Hetta ger støðuna hjá kvinnuni á arbeiðsmarknaðinum enn verri, og verður mett at vera ein álvarsligur trupulleiki, sum meiri enn so kann gerast aktuellur.

*Avleiðingar fyri barnið*
Fyri barnið kunnu avleiðingarnar væntast at vera, at møguleikarnir at fáa tætt tilknýtið til pápan gerast verri, tí fáar familjur hava ráð at vera inntøkuna hjá manninum fyriuttan. Ein nýggj donsk kanning vísur, at pápar í dag eru eins góðir umsorganarpersónar sum mamman, um teir taka lut í umsorganini frá fyrsta degi. Tað er ikki bara bróstageving, sum kann skapa tilknýti til barnið, men ansing og spæl sum heild. Dagsins danskir pápar hava mammu sína sum rollumodel, tí pápar teirra tóku ikki lut í umsorganini á jøvnum føti við mammuna og tí hava teir ikki eina fyrimynd í pápa teirra. Ein psykologur metir, at hetta fer at hava stóra ávirkan í framtíðini, tí menn, sum hava ansað børnum, hava størri innfølingsevnir, gerast meiri tolnir og hava minni lyndi til at gerðast harðligir yvirfyri eitt nú kvinnum.

*Avleiðingar fyri mannin*
Fyri mannin kunnu avleiðingarnar væntast at vera, at hann ikki fær møguleika at vera saman við barni sínum og gerast umsorganarpersónur á jøvnum føti við mammuna. Eisini verður hann einsamallur um at forsyrgja familjuna. Hetta kann gerast ein tung byrða, tí mett verður, at tað eru ikki nógv føoysk húski við smáum børnum, sum klára seg við einari inntøku. Um maðurin skal tryggjast somu rættindi sum føroyska kvinnan í dag sambært lógini hevur, er ein loysn sum nevnt at hann fær serliga farloyvistíð, sum bert hann kann nýta. Um tað ikki ber til at lóggeva fyri hesum ella um ynskið ikki er fyri lóggeving, má onnur loysn finnast, so maðurin ikki verður fyri vanbýti í mun til at taka lut í umsorganini av sínum egnum børnum. Hetta mugu tinglimir tryggja.

**Uppsøgn vegna vantandi ansing**
Fjølmiðlarnir hava seinasta árið lýst støður, har kvinnur eru vorðnar sagdar úr starvi, tí tær ikki kundu møta til arbeiðis eftir farloyvistíðina, og hevur verið nevnt, at hesin trupulleikin verður loystur, um farloyvistíðin verður longd.

Um endamálið við at broyta lógina er at forða fyri, at kvinnur verða sagdar úr starvi, tá ansing vantar, er ikki neyðugt at leingja farloyvistíðina. Í lógini kann standa, at tað er ikki loyvt at siga fólki úr starvi, um tey orsaka av vantandi ansing ikki møta til arbeiðis, tá farloyvið er av. Og kann farloyvistíðin verða longd, tá peningur fylgir við longdu tíðini.

At enda skal vera nevnt, at hendan viðmerking frá Javnstøðunevndini umrøður støðuna hjá kvinnuni á arbeiðsmarknaðinum - og ikki støðuna hjá kvinnuni, sum eftir farloyvistíðina velur at vera heima heldur enn at fara út aftur á arbeiðsmarknaðin.

# Konsert og café í Vági fyri jól

**Ljómur hevur jólakonsert sunnudagin og Stóra Pakkhús skipar fyri café sunnukvøldið. Brandur Enni og Guðrun Jacobsen luttaka í báðum tiltøkunum**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Fleiri tónleikatiltøk eru í Suðuroynni fyri jól. Leygarkvøldið eru dansitiltøk og sunnudagurin hevur ymiskt áhugavert at bjóða.

Sunnudagin klokkan 16 hevur Kirkjukórið Ljómur jólakonsert í Vágs kirkju. Brandur Enni og Guðrun Jacobsen taka lut við sangi.

Stóra Pakkhús skipar sunnukvøldið fyri jólacafé. Har fáast gløgg og holukøkur. Góður tónleikur verður at hoyra, tá Klaus Telling setist við klaverið og Brandur Enni og Guðrun Jacobsen syngja.

# East Salmon fingið góðkenning

**Fyrsta fiskavirkið í Føroyum fingið góðkenning av innaneftirlitsskipanini á virkinum**

FISKIVINNA

East Salmon Fuglafjørður bjóðar til handanina av góðkenningini av innaneftirlitinum á virkinum í Fuglafirði kl. 10. Tað verður Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum handar góðkenningarskjalið.

Í dag, hósdagin hin 19. desember 2002, veitir Heilsufrøðiliga starvsstovan ta fyrstu góðkenningina av eini innaneftirlitsskipan á einum fiskavirki í Føroyum. Góðkenningin verður veitt til East Salmon Fuglafjørður, sum framleiðir portiónir úr alilaksi. Vørurnar verða seldar beinleiðis til detailsølu og catering/stórkøkar.

Góðkenningin er gjøgnumførd sum skoðan av innaneftirlitsskipanin og við uppfylgingum. Teir manglar, sum vóru staðfestir í innaneftirlits-skipanini, eru fingnir í rættlag. Góðkenningin er ein álitisváttan til East Salmon Fuglafjørður, um at virkið er ført fyri at skipa arbeiðið og loysa trupulleikarnar í framleiðsluni viðvíkjandi matvørutrygd. Góðkenningin verður veitt eftir gott og mennandi samstarv við leiðsluna á virkinum.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur skrivað góðkenningarskjalið bæði á føroyskum og á enskum, soleiðis at virkið kann nýta tað beinleiðis í sínum samskifti við kundarnar.

Innaneftirlitsskipanir eru krav til matvøruframleiðandi virkir í Føroyum sambært kunngerð 114/2001. Krøvini eru í samsvari við galdandi ES direktiv á økinum. Skipanin skal vera við til at tryggja, at framleidda vøran ikki er heilsuskaðilig, og at virkið hevur gott heilsufrøðiligt arbeiðslag. Samstundis skal skipanin eisini skjalprógva arbeiðið á virkinum. T.d. skal virkið kunna fara aftur til ávísar arbeiðsdagar og vísa á, hvussu viðurskiftini vóru.

Fyri einstaka virki, herundir East Salmon Fuglafjørður, merkir ein góðkend innaneftirlitsskipan, at virkið yvirfyri Heilsufrøðiligu starvsstovuni hevur prógvað, at virkið innanfyri sínar egnu karmar klárar at stýra sínari framleiðslu innanfyri gott heilsufrøðiligt arbeiðslag.

East Salmon Fuglafjørður sigur, at góðkenningin hevur alstóran týdning fyri virkið og fer at nýta hetta í sølufremjandi tiltøkum. Hetta er ein viðurkenning av tí arbeiði, vit hava gjørt á virkinum, samstundis sum at hetta eisini stillar krøv til okkara.

Hendan fyrsta góðkenningin er ein liður í, at innaneftirlitsskipanirnar á øllum matvøruframleiðandi virkum, skulu góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Talan er um umleið 50 fiskavirkir; 18 verksmiðjuskip; og 10 virkir, sum framleiða til heimamarknaðin.

Heilsufrøðiliga starvsstovan og East Salmon Fuglafjørður.